# Hoyvíkingar taka móti VÍF

**Stóri dysturin í manshondbólti hetta vikuskiftið verður í Hoyvík, har VÍF kemur á vitjan**

MANSHONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Tey bæði liðini eru í løtuni sambiðlar til oddasessin, sum Kyndil í løtuni eigur. Ein oddasessur, sum tó gjørdist væl meira spennandi, eftir at VÍF fyri tveimum vikum síðani so ruddiliga setti teir grønu upp á pláss.
Spurningurin er so, hvørt hoyvíkingarnir av álvara fingu gongd aftur í tendringina, tá teir við einum góðum seinna hálvleiki snaraðu dystinum á Skála fyri tveimum vikum síðani.
Vestmenningar hava kanska ikki heilt somu styrki, sum liðið hevði í fjør, men hóast hetta, so hava avrikini á vøllinum staðið mát. Um somu tíð í fjør var støðan tann sama, sum hon er nú, og megna teir at halda so nøkunlunda fast í fremsta liðnum, er á ongan hátt óhugsandi, at teir eftir jólasteðgin kunnu seta meira ferð á.

### StÍF og Kyndil favorittar

Manshondbólturin byrjar tó longu leygardagin, tá StÍF kemur á vitjan hjá KÍF. Kollfirðingarnir hava higartil ikki fingið nakra serliga úrtøku, og skulu strandingarnir fylgja við fremru liðunum, so er kravið her púrasta greitt ein sigur.
Seinasti dysturin er í Høllini á Hálsi, har Kyndil tekur móti Neistanum. Tann dysturin plagar ofta at draga nógvar áskoðarar, men soleiðis sum gongdin hjá liðunum hevur verið í ár, tykist talan í størri mun vera um avgreiðsluspurning heldur enn harða granna-uppgerð hjá teimum grønu.



*Annað umfarið á rað skal H71 stríðast fyri rættinum at verða liðið, sum eltir oddin*

# Áhugaverd grannauppgerð

**Kyndil hevur higartil tikið tey flestu á bóli í Sunset-kappingini. Sunnudagin skulu tær enn einaferð til próvtøku, tá grannauppgerðin er á skránni**

KVINNUHONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Tað fara at vera nøkur ár síðani seinasta Kyndils-sigurin á Neistanum, tá tosað verður um kvinnuhondbólt. Meðan tær grønu hava havt sera ilt við at finna fótafestið, sum tær mistu um aldarskiftið, hevur Neistin hildið eitt hampuligt støði alla tíðina, tó at heldur ikki tær av álvara eru komnar á siðvandu tindarnar.
Í ár hevur tó verið talan um broyting hjá báðum pørtum. Hóast Stjørnan enn tykist vera sterkari, so hevur Neistin í ár tikið eitt stórt fet móti avgjørda oddinum, og tað er hesa kósina, sum tær royna at halda fast um, tá tær fara á vøllin sunnudagin.
Kyndil hevur hinvegin eisini havt eitt gott ár. Gaman í mundi tapið fyri VÍF seinast oyðileggja eitt sindur, men tað nertir ikki veruleikan, sum staðfestir, at tær grønu enn eru á triðja plássinum á stigatalvuni. Ikki minst takkað verið imponerandi sigrinum á Stjørnuni fyri trimum vikum síðani.
Tí er einki at ivast í, at bæði fara eftir sigrinum sunnudagin, og so kann talan væl gerast um eina grannauppgerð, sum er munandi meira intens, enn hon hevur verið seinastu fýra-fimm árini.

### Avgreiðslur

Tríggir aðrir dystir verða eisini leiktir í kvinnudeildini hetta vikuskiftið.
Í Vági fær Stjørnan leygar-dagin vitjan av StÍF, áðrenn tær sunnudagin ferðast norður til Runavíkar. Í báðum førum tykist talan vera um avgreiðsluspurningar, men trýstið er nú heilt greitt á VB, eftir at tær einki fingu burtur úr dupultumfarinum fyri tveimum vikum síðani.
Seinasti dysturin verður í Klaksvík, har Stjørnan tekur móti Søljuni. Ein dystur, har heimaliðið uttan stórvegis trupulleikar skuldi kunna tikið sær av stigunum.

**SUNSET KAPPINGIN**
KVINNUR

| | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Stjørnan | 10 | 9 - 0 - 1 | 294 | 191 | 103 | 18 |
| 2 Neistin | 11 | 9 - 0 - 2 | 295 | 218 | 77 | 18 |
| 3 Kyndil | 10 | 7 - 0 - 3 | 220 | 215 | 5 | 14 |
| 4 VB | 9 | 6 - 0 - 3 | 230 | 182 | 48 | 12 |
| 5 VÍF | 11 | 5 - 0 - 6 | 264 | 264 | 0 | 10 |
| 6 StÍF | 11 | 3 - 0 - 8 | 249 | 274 | -25 | 6 |
| 7 Søljan | 10 | 2 - 0 - 8 | 173 | 259 | -86 | 4 |
| 8 Tjaldur | 10 | 0 - 0 - 10 | 179 | 301 | -122 | 0 |

**ATLANTIC AIRWAYS KAPPINGIN**
MENN

| | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Kyndil | 8 | 6 - 1 - 1 | 219 | 192 | 27 | 13 |
| 2 H71 | 8 | 5 - 1 - 2 | 238 | 191 | 47 | 11 |
| 3 VÍF | 8 | 5 - 0 - 3 | 228 | 223 | 5 | 10 |
| 4 StÍF | 8 | 4 - 0 - 4 | 205 | 217 | -12 | 8 |
| 5 KÍF | 8 | 2 - 0 - 6 | 207 | 232 | -25 | 4 |
| 6 Neistin | 8 | 1 - 0 - 7 | 220 | 262 | -42 | 2 |

**Flogbóltsstøður**
**Meistaradeild, kvinnur**

| d | v | - | t | sett | v sett | t sett | +/- stig | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Dráttur | 8 | 8 | - | 0 | 24 | 7 | 17 | 16 |
| 2 SÍ | 7 | 6 | - | 1 | 20 | 8 | 12 | 12 |
| 3 TB | 6 | 2 | - | 4 | 10 | 12 | -2 | 4 |
| 4 ÍF | 6 | 2 | - | 4 | 10 | 15 | -5 | 4 |
| 5 Mjølnir | 7 | 2 | - | 5 | 9 | 18 | -9 | 4 |
| 6 KÍF | 8 | 1 | - | 7 | 9 | 22 | -13 | 2 |

**Meistaradeild, menn**

| | d | v | - | t | v sett | t sett | +/- sett | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Fleyr | 5 | 5 | - | 0 | 15 | 5 | 10 | 10 |
| 2 SÍ | 5 | 4 | - | 1 | 14 | 5 | 9 | 8 |
| 3 Mjølnir | 6 | 3 | - | 3 | 12 | 9 | 3 | 6 |
| 4 ÍF | 6 | 2 | - | 4 | 10 | 14 | -4 | 4 |
| 5 Nøvan | 6 | 0 | - | 6 | 0 | 18 | -18 | 0 |